## Døpur útlit frá IMF

Altjóða Gjaldoyragrunnurin IMF sigur í einari nýggjari meting, at búskaparkreppan verður drúgv, at eingin sleppur undan henni, og harafturat fer støðan at batna spakuliga, tá tað batin eina ferð kemur. Grunnurin sigur eisini, at minkandi hugurin at gera íløgur fer at raka lond í Eysturevropa serliga meint. Dominique Strauss-Kahn, aðalstjóri í IMF, segði í einari røðu í National Press Club í Washington í gjár, at "2009 verður uttan iva eitt ræðuligt ár", og hann legði bafturat: -Hetta er sanniliga ein alheimskreppa, og henni sleppur eingin undan.




## Eldur í »Queen of Scandinavia«

Eingin fekk skaða, tá eldur kom í maskinrúmið á ferðamannaskipinum "Queen of Scandinavia", sum liggur við bryggju í Svøríki. "Queen of Scandinavia" er ikki í sigling, men hýsir millum 800 og 1.000 fólkum, sum arbeiða á kjarnorkuverkinum i Oskarshamn nakað norðan fyri Stockholm. Tað var um tíggjutíðina í gjárkvøldið, at eldur kom í maskinrúmið. 238 fólk vóru umborð á skipinum, og tað eydnaðist at fáa tey í land í øllum góðum. Einar tríggjar tímar sennni var eldurin skøktur, men tað er frávegis, hví eldur kom í, skrivar TT. Hinvegin hevur skipið fingið so mikið av skaða, at tað er ivasamt, um tað kann hýsa starvsfólkinum á kjarnorkuverkinum.

# Løgmaður krevur arbeiðsfrið

**Kaj Leo Johannesen, løgmaður, krevur nú at fíggjarmálaráðharrin fær arbeiðsfrið. – Eg veit hann er í góðum dialogi við fakfeløgini, og hann skal hava frið til hetta, so vit aðrir ikki skaða dialogin, sigur hann**

SAMFELAGSBÚSKAPUR

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Føroya løgmaður, Kaj Leo Johannesen, krevur nú at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fær arbeiðsfrið til at loysa avbjóðingarnar í framtíðar búskaparstøðu Føroya.

Seinastu dagarnar hevur nakað av rumbli verið av útsøgnini hjá Anfinni Kallsberg um, at lønarsteðgur eigur at verða settur í verk, antin av egnum vilja ella við lóg.

Útsøgnin hjá formanninum í fíggjarnevnd Løgtingsins fekk ilt í fíggjarmálaráðharran Jóannes Eidesgaard, sum sló fast at hann ongantíð vil ganga við til at løggeva lønarsteðg, samstundis sum hann eisini langaði út eftir Anfinni Kallsberg. Lagt var upp til rok í samgonguni, men nú vil Løgmaður leggja lok á og fáa arbeiðsfrið.

- Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur fullan uppbakning frá løgmanni. Eg veit at hann er í góðum dialogi við fakfeløgini, og tað er týdningarmikið at hann nú fær frið til hetta, soleiðis at vit aðrir politikarar ikki skaða henda dialog. Vit sita øll í sama báti, og tað er av stórum týdningi at vit rógva somu takt, slær Kaj Leo Johannesen, løgmaður, fast.



*Vit sita øll í sama báti, og tað er av stórum týdningi at vit rógva somu takt, slær Kaj Leo Johannesen, løgmaður, fast*

### Krevur null vøkstur í útreiðslum

Spurdur, hvat løgmaður heldur um at løggeva lønarsteðg, til tess at spara pening, vil hann ikki úttala seg um júst tað evnið. Hinvegin slær hann fast, at útreiðsluvøksturin hjá tí almenna fyri 2009 og fyri 2010 skal vera null.

- Hvussu tað so verður gjørt, tað sita vit so og arbeiða við. Men eitt er víst, og tað er, at tað skal vera útreiðsluneutralt. Null útreiðsluvøkstur, sigur Kaj Leo Johannesen.

*Í oktober 2009 standa lønirnar at vaksa við trimum prosentum. Hetta merkir eina øking í útreiðslunum hjá tí almenna til lønir á góðar 60 milliónir krónur, og skal útreiðsluvøksturin samstundis verða null, so merkir tað væl, at tað má sparast aðrastaðni?*

- Nei, vit tosa als ikki um at spara. Tað mugu gerast nakrar rationaliseringar aðrastaðni í systeminum. Øll í systeminum skulu tí út at hyggja upp á, hvussu vit kunnu koma til ein útreiðsluvøkstur, sum er null, staðfestir Kaj Leo Johannesen, løgmaður.

### Tað má raka rætt

Meðan Kaj Leo Johannesen leggur dent á at almennu útreiðslurnar ikki skulu vera eina krónu hægri í 2010, enn í 2009, leggur hann eisini dent á, at tað verður rakt rætt.

- Vit sita við eini vekting millum inntøkur og útreiðslur í løtuni. Tað hevur stóran týdning hvørjar kranar í maskinrúminum, tú skrúvar upp á, soleiðis at tað rakar rætt. Tí er tað at stórum týdningi at fíggjarmálaráðharrin fær arbeiðsfrið.

Hann heldur tað eisini vera undarligt, tá ávísir politikararnir melda ymiskt út í eyst og vest.

- Allir 33 tingmenn vita, at tað standa stórar avbjóðingar fyri framman. Alheims fíggjarkreppuna kunnu vit einki gera við. Prísirnir á alheimsmarknaðinum gera vit einki við. Útreiðslurnar hjá okkum sjálvum, tað kunnu vit gera nakað við, og tað er 100 prosent sikkurt, at vit loysa tann trupulleikan, sigur Kaj Leo Johannesen.

# Snella horvin í stilluviku

**Í stilluviku hvarv ein snella úr einum báti, sum lá við Langubrúgv í Havn. – Og hetta er ikki fyrstu ferð, at ting hvørva úr bátum, sigur ein firtin Jóhan Restorff, bátaeigari**



*Tað er úr bátinum Havfrúgvin, at onkur hevur tikið eina snellu um páskirnar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

STULDUR

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Enn einaferð mugu vit tíverri sanna, at lutir, sum liggja í bátum í Havn, eru ov freistandi fyri veikar sálir og langar fingrar.

Seinnapartin í gjár varnaðist Jóhan Restorff, bátaeigari í Havn, at ein DNG-snella var burtur úr báti hansara, sum lá við Langubrúgv í Havn.

- Vit bátaeigarar eiga at kunna líta á hvønn annan. Tað kann ikki vera rætt, at tingini ikki fáa frið, sigur ein Jóhan Restorff við Sosialin.

Snellan, sum hevur eitt virði upp á einar 30.000 krónur, er tikin úr bátinum í stilluviku, og bara stativið stóð eftir, tá hann kom umborð á bátin aftur aftan á páskir.

Tilburðurin er meldaður til løgregluna, sum sigur, at tað meiri enn so kemur fyri, at línur, snellur og annað hvørva úr bátum, sum liggja við bryggju.

Jóhan Restorff heitir á fólk, sum hava sæð ella upplivað okkurt illgrunavert, um at seta seg í samband við seg ella løgregluna.

# Her skal berghylurin gerast

**- Tá vit seta okkum nakað fyri, so gera vit tað, segði Jón Bjarnason, venjari og ein av stigtakarunum til ætlanina. Á myndini sæst, hvar ætlanin er at gera 50 metra svimjihylin**



*Tað er frá SEV verkinum niðast í myndini, at hylurin, ið skal borast inn í bergið innanfyri, eftir ætlanini skal fáa streym frá*

*Mynd: Dagfinn Olsen*

SVIMJIHYLUR

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í gjár skrivaði Sosialurin um svimjihylin, sum sjálvboðin ætla at gera til Pál Joensen. Inn er ætlanin ikki komin so langt, men ymiskar tekningar eru longu gjørdar, og størsta ivamálið er, hvussu breiður hylurin skal verða.

- At bora eitt hol kostar ikki so nógv, serliga nú tað koyrir so illa í Noregi. Tað, sum serliga kemur at kosta, er breiddin, segði Jón Bjarnason í gjár.

Tó er eitt annað ivamál, um SEV vil lata avlopshitan hjá sær til berghylin, tí tað eru eftir øllum at døma onnur, ið liggja framvið hitanum.

Eisini er innsavning gjørd til hylin á Suðuroyarportalinum, og har eru góðar 25.000 krónur komnar inn.